# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nú ræður um at kenna sær hógv

Løgmansrøðan var, sum tað kundi roknast við. Løgmaður brúkti nógva tíð til at vísa á, hvussu gott hann heldur áralagið hevur verið í samgonguni, og hvussu nógv er avrikað. Serliga fegin segði hann seg vera um yvirtøkulógina og yvirtøkurnar – ikki minst av kirkjuni henda søguliga ólavsøkudagin.
Hvussu samd og ósamd samgonga og andstøða eru um politiska áralagið og avrikini fer at vísa seg, tá ið politikararnir í morgin og restina av vikuni fara at skifta orð um røðuna.
Løgmaður vísti á, hvørji mál samgongan hevur eftir at loysa næstu mánaðirnar. Lítið ítøkiligt varð sagt um, hvat samgongan hevur ætlanir um at fremja eftir valið. Orsøkin er einføld. Í Føroyum er tað ikki skikkur, at samgongan fer til val við boði upp á, hvat samgongan ætlar skal fremjast í nýggja valskeiðnum. Okkara tradition er, at flokkarnir plaga og vilja vera púra óheftir av hvørjum øðrum í valstríðnum.
Spurningurin er, um hetta ikki átti at verið broytt. Orðaskiftið um løgmansrøðuna er startskotið upp á valstríðið. Tí hevði tað sømt seg, um politikararnir nú góvu til kennar ikki bara, hvat teir ætla næstu árini, men eisini hvørjum teir ætla at fremja politikkin saman við, og hvussu teir ætla, at málini skulu fíggjast. Tað hevði verið ábyrgdarfult, og tað hevði ivaleyst havt við sær, at politikararnir høvdu kent sær meiri hógv.
Tvey stórmál, sum hava verið nógv viðgjørd, hanga framvegis í leysum lofti. Annað er valskipanin, og hitt er pensiónsspurningurin.
Løgmaður segði seg vera fyri einum valdømi, og at spurningurin eftir hansara meining átti at verið avgjørdur á fólkaatkvøðu. Talan er um stórt mál og radikala broyting. Tí er einki at siga til, at fólkið verður spurt. Men tað er ikki í andanum av okkara tradition, at málið verður skundað ígjøgnum, nú valið bara er nakrar mánaðir burtur. Nú hevur verið prátað og skrivað uttan úrslit í hálvt fjórða ár, og politisk undirtøka var ikki fyri uppskotinum um broytingar, sum ætlanir vóru um at leggja fyri tingið. Valfeløgini eru longu farin undir uppstilling eftir galdandi vallóg. Radikalar broytingar, nú tað er minni enn hálvt ár til valið, høvdu kenst sum statskvett. Her eigur Løgtingið at kenna sær hógv.
Pensiónsmálið verður aftur hesa ferð partur av valstríðnum. Løgmansrøðan boðaði ikki frá meiri semju og ítøkiligum ætlanum enn orðingarnar í samgonguskjalinum. Tað hevði sømt seg, um politikararnir og samgongan næstu dagarnar markeraðu, hvat tað er, sum samgongan ítøkiliga er samd um at fremja á hesum økinum, og um andstøðuflokkarnir góvu sítt ítøkiliga íkast.
Hóast stórar betringar í samhaldsfasta í hesum valskeiðnum, so er pensiónsmálið framvegis eitt av teimum størstu, sum liggur eftir at fremja, og sum politikararnir eiga at kenna sær hógv í at fremja.

**Sosialurin**

## Kann Sandoyartunnilin bíða?

**EYÐUN MOHR VIDERØ**

Fíggjarligu umstøðurnar hava sett stóra ferð á búskapin, og nú verður tosað, um tað ikki er neyðugt at steðga á og tálma hesur stóru samferðsluíløgunum.

Tá byrjað varð at gera tann fyrsta undirsjóartunnilin, ið var til Vágarnar, vóru mong, ið ivaðust um tann tekniska partin, at gera ein tunnil undir havbotninum, og um hesin ikki fór at kosta nógv meir, enn játtaðu upphæddirnar søgdu, og var hetta sjálvandi, tí ongar royndir hesum viðvíkjandi vóru at miða seg eftir.

Hetta arbeiði gekk væl, helst betur, enn nakar tordi at vóna, og framhaldið við tunnlinum til norðoyggjar hevur víst tað sama.

Politikarar settu tí út í kortið, at tá liðugt var til norðoyggjar, so skuldi haldast fram til Sandoynna. Vit hava onki annað hoyrt síðan tá, enn at hetta var ætlanin, so sjálvsagt hava bæði sandoyggjafólk og onnur, ið ynskja at flyta til Sandoynna at búgva, sett sítt álit á hesa verkætlan. Upplýst verður hiðani, at umleið 60 grundstykki eru umbiðin í ymisku bygdunum, og sjálvandi er hetta í vissuni um, at tunnilin kemur skjótt.

Í dag síggja vit, at gjørdu tunnlarnir hava ein áður ókenda ávirkan á umstøður og trivna fyri hesi økini og samstundis fyri landið.

Tí er tað, at vit í Sandoynni kenna tað sum heilt avgerandi fyri framtíðina hjá fólkinum her býr, og eisini fyri tey, ið ætla at flyta higar, eins og fyri tey ið skulu setast í búgv fyrstu ferð og ynskja at búgva í Sandoynni, at vit við einum tunnli eru hava javnari ferðasamband alla tíðina, bæði hvat viðvíkur flutningi av rávøru til virkingar og vørur annars eins og fluttning av arbeiðsfólki, ferðafólki v.m., og harvið eru vit eisini nærri miðøkinum, sum í hesum tíðum er ein partur av arbeiðs- og trivnaðarumstøðunum.

Tosið um yvirupphitaðan búskap kann ikki viðføra, at tunnilsarbeiðið verður útsett ella steðga, tí tað verður enn verri fyri landið sum heild, um Sandoyggin verður slept upp á fjall við einum ”køldum” búskapi!

Opið bræv frá Útoyggjafelagnum til Føroya Løgting 28. juli 2007

## Ólavsøkubræv til Føroya Løgting

**Umboðsráð og starvsnevnd í Útoyggjafelagnum: Óla Jákup úr Dímum, formaður í starvsnevndini, Fríða Isaksen, formaður í umboðsráðnum**

Ólavsøkan er tjóðarhátíð okkara, og byrjanin upp á eina nýggja tingsetu. Við hetta høvi, vilja vit heita á Føroya Løgting, um at taka støðuna hjá útjaðaranum til umhugsan, og í komandi tingsetu, at taka munagóð stig, til at hjálpa hesum parti av landi okkara á føtur aftur.

“Okkara forfedrar settu førningin av við vegin”, førning, ið vit taka á okkum og bera víðari. Hesin førningur, ið er mentan okkara, verður borðin av fólki í øllum oyggjum og bygdum. Men umstøðurnar á nøkrum av oyggjunum eru so vánaligar, at fólkið noyðist at ríma, og tí stendur førningurin eftir í manntómun gøtum.

Við hesari gongdini, missa vit eina túsund ára gamla mentan, ið byggir á fjølbroytni og ymiskleika, og sum hevur lagt lunnar undir tann framburð, sum skal tryggja framtíð Føroya.

Tað er ábyrgd løgtingsins, at verja øll øki og alt fólkið í landið okkara. Føroyar eru 17 bygdar oyggjar, og tað er ikki ein gongd leið, at krøkja nakarar av oyggjunum av, fyri at tryggja eitt høgt vælferðarstøði í øðrum partum av landinum.

Útoyggjafelagið setir sítt álit á, at tað er ein vilji til at menna og skapa liviumstøður á okkara minstu oyggjum og vónar, at hesin vilji kemur at vísa seg í verki. Felagið er sinnað til at vegleiða og vísa á gondar leiðir, við vón um eina bjarta framtíð fyri alt land okkara.

Við ynski um eina góða Ólavsøku

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.